gult16 cyan16 magenta16 svart16



Í Býin

# Platform

**Platform eitur nýggjasta diskotekið í Havn. Stjórin eitur Havgrím Johannesen, og er eisini einasti eigari. Sosialurin var mikumorgunin niðri í Havnar klubba, har Platform heldur til, og fekk eitt prát við Havgrím.**

*Óluva Ellingsgaard*




*Havgrím (høgrumegin) saman við einum vini*

Fyri umleið fýra vikum síðani var leigusáttmálin undirskrivaður, og nakrar dagar aftaná kundi Havgrím byrja at »flyta inn« í Klubban. Seinasta fríggjakvøld var longu opið fyrstu ferð. Tað hevur altso einans tikið tríggjar vikur at fáa alt klárt. Hetta hevur ikki verið heilt uttan stríð. Tað hevur verið arbeitt í døgndrift, og mestsum alt er sjálvboðin hjálp. Havgrím metur seg at hava spart eini 100.000 krónir við hesum, og er hann sera takksamur fyri alla tað hjálp hann hevur fingið. Heini Weihe frá ErgoDesign hevur designað alt innan, meðan Magnus Bjarnarson hevur saga og smíða barrdiskar, og har afturat hevur nógv hjálp verið frá vinum. Alt er ikki heilt liðugt enn, men tað er ikki nógv sum manglar. Inni er ljóst, veggirnir eru hvítir og møblarnir eisini, og millum annað tað sum manglar, eru nakrir hvítir leður barrstólar. Myndirnar sum hanga inni í Kongasælinum eru 150 ára gamlar, tær blivu málaðar uppá sjálvar veggirnar í gamla klubbanum, og tá hann var rivin niður, blivu myndirnar skornar út úr vegginum, og ramma koyrd rundan um. Og nú hevur Havgrím fingið loyvi at hava tær hangandi í sínum nýggja diskotekið.

Fríggjakvøldið var sum sagt opið fyrstu ferð. Orsøkin til at tað ikki var blivið lýst, var tí at eingin var heilt sikkur uppá, um tað mundi fara at blíva liðugt til tíðina. Men tað gekk - og sjálvt uttan lýsingar komu knapt 300 fólk forbí. Leygarkvøldið var opið fyri innbodnum, og húsið var fult alt kvøldið.

Havgrím ætlar sær ikki at stilla seg í hurðina og sortera fólk. At byrja við verður tað ikki nakað aldursmark sum so, men fer tað at vísa seg at verða ein trupulleiki, er ætlanin at alduramarkið skal verða 20 ár.

Umframt, at hava opið sum eitt vanligt diskotek í vikuskiftinum, er eisini ætlanin at leiga út mitt í viku, sum til dømis til innbodnar døgurðar ella brúdleyp. Hann hevur longu fleiri avtalur. Millum annað skal tann íslendski forsætisráðharrin hava døgurða fyri einum 100 fólkum seinast í juni mánaði. Stavanger kommuna hevur eisini leiga Platform til eina gallaveitslu í summar. Stavanger er ein tann størsti oljubýurin í norðurlondum, og tí kundi tað ikki verið meira upplagt enn at leiga Platform - !

Hetta fekk okkum inn á oljuna. Orsøkin til at Havgrím hevur valgt at kalla diskotekið hjá sær platform er einkul. Vit vita øll hvat ið hendir innanfyri oljuheimin í Føroyum í dag og hvussu aktuelt tað er, so einki hevði verið meira passandi enn eitt »oljudiskotek«. Tá tú ert komin inn á Platform kanst tú fara bæði til supplybase 1 ella supplybase 2, sum hann hevur valgt at kallað barrirnar. Har hevur tú møguleikan at keypa sjussar sum Oil Rig, Refinery ella Oljutunna. Eisini fært tú »shotsar« sum Bensin, Diesel ella spillolja. Umframt hetta, er ætlanin at starvsfólkið skulu verða í onkrum serligum klæðum.

Men var tað ikki meiningin at tað skuldi eita 25-35? »Jú, men mær dámdi ikki navnið, tí tá hevur tú beinanvegin lagt teg út eftir einum serstakum aldursbólki, og tað haldi eg ikki er so gott«, sigur Havgrím sum nú einsamallur hevur opnað Platform. Upprunaliga var meiningin at hann og eigarnir av Club 20 og Cafè Natúr skuldu reka diskotekið saman.

Starvsfólkið, sigur Havgrím, er tað besta í Føroyum. Hann hevur fingið eitt sindur úr hvørjum stað kann man siga. Onkur er komin frá Club 20, onnur frá Casablanca og tey triðju frá Kagganum. Hann hevði longu fyri eini tíð síðani, skaffa sær fólk til at arbeiða seinasta vikuskiftið, men skuldi hava nøkur afturat. Hann setti eina lýsing í Sosialin og ikki færri enn 70 fólk søktu. Spurdur um hann ætlaði at hava mest DJ ella um livandi musikk, svaraði hann: »eitt sindur av hvørjum«, hann ætlar sær at royna at hava livandi musikk umleið triðja hvørt vikuskiftið. Og hetta verður við bólkum sum All That Rain, sum eisini spældu seinasta vikuskiftið, Tangz, Taxi og Hjarnar.

## Christian og Michael til Føroyar

Í dag koma Christian og Michael til Føroyar, teir kenna øll sum fylgdu við í Barrini, sum var send á TV3 fyri nøkrum vikum síðani. Teir skulu verða barrvørðar á Platform hóskvøldið og fríggjakvøldið. Hóskvøldið frá kl. 21 til 24! Tá eg spurgdi Havgrím hvar hann hevði fingið hetta hugskotið frá, segdi hann: »eg havi leingi arbeitt við marknaðarføring, millum annað stóð eg fyri fyrireikingunum tá DAD og D. J. Alligator vóru í Føroyum. Og skuldi tí vita hvat skal til fyri at fáa fólk áhugaði«.

Hann sigur at tað er eingin trupulleiki at fáa tónleikabólkar ella einstaklingar til Føroyar. »Eg ringdi bara niður til Danmarkar og spurdi. Tað er eisini gott at hava tær røttu kontaktirnar, og hví ikki brúka pengarnar upp á eitt tiltak sum hetta, tá tú alíkavæl hevði brúkt líka nógvar pengar, ella kanska meira, uppá t.d. eina sjónvarpslýsing«.

Aftaná at hava sæð Platform og tosa við Havgrím, verður tað spennandi at síggja hvussu fer at gangast honum. Hetta vikuskiftið fara uttan iva nógv fólk at koma, og síggja teir báðar frá barrini.

Við hesum, fara vit at takka stjóranum á Platform, Havgrím Johannesen fyri prátið. Hann er nú einans stjóri í talu, tí sambært tí føroysku, eitt sindur avoldaðu rúsdrekkalógini, er tað bara loyvi at geva skeinkiloyvi til fólk yvir 25 ár, og tá Havgrím einans er 23 ár, er tað í veruleikanum mamma hansara sum er stjóri, so at enda vilja vit ynskja teimum báðum góða eydnu við Platform.

gult17 cyan17 magenta17 svart17

Bilar

Nr. 107 • fríggjadagur • 8. juni 2001 • 75. árg.

### Hyundai Santa Fe 2.0 GLS 4WD

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 4 syl. 16V 112 hk turbodiesel v. intercooler og common rail innspræning |
| 0-100 km/t: | 14,9 sek |
| Oljunýtsla: | 13,2 km/l |
| Dekkstødd: | 225/70-16 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 450,0 cm |
| Breidd | 185,0 cm |
| Hædd | 168,0 cm |
| Eginvekt | 1650 kg |
| Totalvekt | 2375 kg |
| Viðførisrúm | 833 litrar |
| Prísur: | 2.0 GLS stationvognur kr. 350.750,- <br> 2.0 GLS vøruvognur kr. 280.750,- |
| Søluumboð: | P/F Norðbil <br> Oyggjarvegur <br> FO-110 Tórshavn <br> Tel. 313707 |

# Hyundai Santa Fe – teknaður í Kalifornia, gjørdur í Korea




*Hyundai Santa Fe er teknaður í Kalifornia og gjørdur í Korea*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Hyundai Santa Fe kom á amerikanska marknaðin í 1999, og til Europa í 2000. Orsakað av tí ovurstóra eftirspurninginum eftir bilinum, er hann ikki komin á danska og føroyska marknaðin fyrr enn nú**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Fyri at tekkjast amerikanska og evropeiska marknaðinum, var eitt designstudie í Kalifornia biðið um at teknað Santa Fe. Í sínum byrjunarstøði skuldi Santa Fe verða ein sterkur og annarleiðis framtíðarbilur, samstundis skuldi ongin ivast í at hann var ein Hyundai. Úrslitið er ein SUV (Sport Utility Vehicle) bilur, sum livir upp til tað stevnumið, teir settu sær. Hóast bilurin er teknaður í USA, verður hann gjørdur í Korea.

### Amerikanskar koyrieginleikar

Innan er alt merkt av góðum og gjøgnumførdum kvaliteti. Tá man setur seg við rattið á Santa Fe, situr man høgt og væl, eins og alt er gjørt fyri at tey ferðandi skulu sita væl. Í tí rúmligu kabinuni er ríkiligt av plássi til fimm fólk við viðføri. Viðførisrúmið er 833 litrar. Bilurin hevur góðar og tryggar koyrieginleikar. Fjaðraskipanin minnir nógv hana á amerikansku bilunum, og Santa Fe liggur væl og fast á vegnum.

### Mest áhugaverdur sum diesel

Santa Fe fæst við trimum bensin- og einum dieselmotori, sum verður tann mest áhugaverdi her hjá okkum, eins og í nógvum øðrum londum. Bilurin, vit hava fyri okkum, er ein 2.0 GLS 4WD diesel. Hesin fýra syl. CRDi dieselmotorurin við 112 hk og Bosch commonrail tøkni, hevur góða kraft og passar væl til bilin. Bensinmotorarnir eru: 2.0 litur við 134 hk, 2.4 litur við 145 hk og 2.7 litur V6 við 197 hk.

### Fimm stjørnur

Santa Fe kláraði seg sera væl í amerikansku NCAP-testunum, har hann fekk fimm stjørnur fyri trygdina hjá bilførara og teimum ferðandi. Fýra airbag framman er standard. Einans í standard útgávuni fæst Santa Fe við framhjólstrekki. Hinar útgávurnar trekkja á øllum 4 hjólunum, har 60 prosent av kraftini verður yvirførd til framhjólini og 40 prosent til bakhjólini. Um brúk er fyri at deila kraftina annarleiðis, hevur hann eina viscosekobling sum deilir kraftina til tey hjólini har brúk er fyri tí. Santa Fe er sera væl útgjørdur við øllum tí, sum hoyrir til ein nútímans bil.



*Innan er alt merkt av góðum og gjøgnumførdum kvaliteti*

*Mynd: Jens K. Vang*

